Skrivlig próvtøka, 9. flokkur
maj-juni 2013

**Føroysk fyrisøgn**

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild, síðan verða eini 3-5 orð, sum tað hóskar, lisin tvær ferðir. Av teknum verða bara punktum og rópitekn lisin, og reglubrotini verða tilskilað. Tað er næmingunum loyvt at brúka føroyska orðabók til próvtøkuna.)

Tá ið tey vóru komin / út úr kirkjugarðinum, / tók hon armin / spakuliga til sín. / Mostirin spurdi, / um hon ikki kom / heim til teirra /at fáa ein drekkamunn. / Hon hevði búð hjá teimum / ta fyrstu tíðina, / hon hevði verið / her í bygdini. / Men har hevði verið / so trongligt, / og mostirin / legði seg út í alt. / Hon líktist mammuni. / Ein genta, ið arbeiddi har, / sum hon arbeiddi, / hevði sagt henni frá / einum bíligum kamari, / og hon hevði verið / so heppin / at fáa tað. / Tá ið tey komu / til ein krossveg, / takkaði hon fyri og segði, / at hon mátti royna / at fara aftur til arbeiðis. /

Tað var gott / at vera einsamøll aftur. / Hon kom / fram við einum beinki / og hevði bestan hugin / at seta seg á hann, / men tað kundi ein ikki, / tað sá so løgið út, / eingin gjørdi slíkt heldur. /

*Tillagað brot út stuttsøguni ”Barnið” eftir Steinbjørn B. Jacobsen*